HEILSU- OG INNLENDISMÁLARÁÐIÐ

Tórshavnar kommuna
Postsmoga 32
110 Tórshavn

23. juni 2016
**Mál**: 16/00520-7
**Tygara Skriv**:
**Viðgjørt**: ÓJH/KHP

**Viðvíkjandi broyting í serstøku byggisamtyktini fyri útstykkingina við Hjaltarók**

Eftir reglunum í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, hevur Tórshavnar kommuna sent Heilsu- og innlendismálaráðnum uppskot til broytingar í serstøku byggisamtyktini fyri útstykkingina við Hjaltarók til góðkenningar.

Tað snýr seg um at broyta ásetingarnar fyri matr. nr. 1228d, 1228e, 1228f og 1228g við Hjaltarók soleiðis, at byggjast kann í 3 fullum hæddum á hesum grundøkjum. Byggistigið og nettonýtslustig skal tó vera sambært ásetingunum fyri A1-øki í almennu byggisamtyktini.

Sagt verður frá, at Heilsu- og innlendismálaráðið við heimild í § 4 í býarskipanarlógini góðkennir broytingina í serstøku byggisamtyktini fyri útstykkingina við Hjaltarók, sum omanfyri nevnt.

Víst verður eisini til ætlanarskrivið, dagfest 17. juni 2016.

Hjálagt rættaður byggisamtyktartekstur fyri serstøku byggisamtyktina fyri útstykkingina við Hjaltarók við átekning frá Heilsu- og innlendismálaráðnum.

Vinarliga

Ólavur J. Hansen
løgfrøðingur

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304050 • Fax: +298 304025 • E-mail: himr@himr.fo

**SERSTØK BYGGISAMTYKT FYRI**
**MATR. NR. 1227A OG 1228A VIÐ OYGGJARVEGIN Í TÓRSHAVN**

Broytt 23.06.2016

Við heimild í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir frá 21. mai 1954, verða skipaðar hesar reglur fyri tað øki í Tórshavnar kommunu, ið nevnt er í 1. grein.

## §1. ØKI SAMTYKTARINNAR

Stk. 1. Økið ið serstaka byggisamtyktin er galdandi fyri, er avmarkað, sum sýnt er á viðfestu kortskjølum 1 og 2 dagf.28.04.2011, matr. nr. 1227a og 1228a við Oyggjarvegin í Tórshavn og allar jarðarlutir, sum eftir góðkenning av hesi byggisamtykt verða frábýttir nevndu ognum.

## §2. FRÁGREIÐING UM ØKIÐ

Stk. 1. Endamálið við hesi serstøku byggisamtykt er at skipa bústaðarbygging á økinum.

Stk. 2. Útstykkingin er tilsamans uml. 15.400 $m^2$ til støddar og liggur í einum A1 øki, sum sambært almennu byggisamtyktini kann brúkast til bústaðir.

Stk. 3. Útstykkingin hevur 23 grundøkir til stakhús, stórt fríøki og felags parkeringspláss.

Stk. 4. Grundøkini eru uml. 400 - 620 $m^2$ til støddar .

Stk. 5. Vegatgongd til útstykkingina verður frá Hjaltarók.

Stk. 6. Á kortskjølunum stendur fermetratal fyri hvørt grundøki. Hesi kunnu verða reguleraði í ein vissan mun í sambandi við projektering og matrikulering.

Stk. 7. Sambært kap. IV, §5, stk. 2. í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu skulu grundøkini í A1-økjum vera í minsta lagi 500 $m^2$. Tá byggingin verður framd eftir heildarætlan, sum býráðið hevur góðkent og tryggjað, ella eftir serstakari byggisamtykt, kann býráðið loyva, at grundstykkini eru minni enn 500 m2, tó í minsta lagi 400 $m^2$ fyri stakhús og 300 $m^2$ fyri hvønn partin av tvíhúsum, ketu-ella raðhúsum. Ein partur av minstuvíddini kann verða lagdur sum felagslendi og sum bilstøðil.

Stk. 8. Fyri viðurskifti, sum ikki eru regularaði í hesi serstøku byggisamtykt eru ásetingarnar í almennu byggisamtyktin fyri Tórshavnar kommunu galdandi.

## §3. NÝTSLA ØKISINS

Stk. 1. Økið skal nýtast til sethúsabygging.

Stk 2. Eisini er møguligt at hýsa minni virksemi, ið eru flokkað í umhvørvisflokki 1 í Umhvørvisflokking fyri Vinnustykkir í Tórshavnar kommunu, samtykt av býráðnum 19. februar 2009, har tað verður mett ráðiligt av býráðnum.

Stk. 2. Hetta virksemið skal avmarkast soleiðis, at tað ikki førir við sær nakra ferðslu frá starvsfólki ella viðskiftafólki til og frá økinum.

Stk. 3. Eitt eigarafelag skal skipast fyri útstykkingina, har allir eigarar skulu vera limir.

## §4. BYGGING, STØDD, STAÐSETING OG SKAPILSI HÚSANNA

Stk. 1. Byggistig og nettonýtslustig sambært ásetingum fyri A1-økir í almennu byggisamtyktini.

Stk. 2. Á hvørjum grundøki kann byggjast eitt stakhús, sum eisini kann hava eina minni íbúð, sum tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð.

Stk. 3. Grundstykkini matr. nr. 1228d, 1228e, 1228f og 1228g kunnu byggja í 3 fullum hæddum.

Stk. 4. Hægsta punkt við útvegg, fyri omanfyri nevndu grundstykkir, skal ikki verða hægri enn 9,0 m frá planering.

Stk. 5. Bilhús/bilskúr/úthús/yvirdekkað øki verða bert roknaði uppí nettonýtslustigið við tí samlaðu víddini, ið fer upp um 10% av grundøkinum, tó í mesta lagi 50 $m^2$.

## §5. BYGGING IÐ ER

Henda byggisamtykt er ikki til hindurs fyri, at núverandi lóglig bygging verður varðveitt, ella at hildið verður fram við lógligari nýtslu av eini ogn.

Stk. 2. Ikki er loyvt at vaksa um hús við at byggja um, ella at taka tey til aðra nýtslu ímóti reglunum í byggisamtyktini.

## §6. BYGGINGARMYNDULEIKI OG ÁTALURÆTTUR

Byggingarmynduleiki og átalurættur eru sambært hesi byggisamtykt hjá Tórshavnar býráð einsamøllum.

## §7. UNDANTAKSLOYVI FRÁ BYGGISAMTYKTINI OG BROYTINGAR Í HENNI.

Smávegis frávik frá reglunum í hesi byggisamtykt kann býráðið geva loyvi til, um so er, at dámur á økinum, sum byggisamtyktin roynir at skapa ella varðveita, ikki verður broyttur av teirri orsøk.

Stk. 2. Broytingar í byggisamtyktini kunnu verða gjørdar eftir samtykt býráðsins og góðkenning landsstýrisins eftir reglum um samtykt og góðkenning av nýggjum byggisamtyktum.

| HEILSU -OG INNLENDISMÁLARÁÐIÐ | |
|---|---|
| Mál nr.: | 16/00520 |
| Ætlanarskriv: | 17/6-2016 |
| Góðkent: | 23/6-2016 |
| Váttað: | [signature] |